HOFF STOFF

Sita eftir v

Mátti sleppa at keypa Mary eina gávu

Tíggju ára gamla Halla Sørensen á Tvøroyri hevði eina heilt serliga gávu til Mary Krúnprinsessu og hon fekk klemm frá Mary afturfyri

À Tvøroyri var ein lítil genta serliga spent uppá at Mary Krúnprinsessa skuldi koma á vitjan

KONGLIG VITJAN

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

À Tvøroyri vóru tey líka spent sum alla aðrastaðni at sleppa at heila uppá tey kongligu, nú ter eru er Føroyum.

Men tó skerst ikki burtur, at ongin var so spentur sum 10 ára gamla Halla Káradóttir. Hon er púra burtur í Mary, krúnprinsessu og gekk aftaná tey allastaðni har tey vóru á Tvøroyri.

Men kortini gav hon mammuni ein lítlan hvøkk, tá ið hon ringdi heim og segði, at nú fór hon at keypa Mary eina gávu.

Og tað nyttaði onki at muta ímóti tí Halla hevði sett í seg, at hon mátti sleppa at geva Mary eina gávu.

Hon hevur akkurát verið í Danmark og ferðast og hevði eitt sindur av lummapengum til avlops.

So er spurningurin, hvat gávan skuldi vera.

Hon tímdi ikki at geva henni blomstur, tí tað gjørdi øll hini. Tí helt hon leiðina inn í CN-Wear Tvøroyri, har hon keypti tvinnar pinkubarna-sokkar og fekk teir pakkaðir inn í ein gávupakka við bandi um við sloyfu á.

Ein so øll onnur hevur Halla fingið við, at Mary er við barn og at krúnprinsaparið verður foreldur í heyst.

Og tá ið krúnprinsaparið gekk av sjúkrahúsinum oman á Dannebrog, stóð Halla klár í keibrekkuni við hesum lítla pakkanu í hondini. Og tá ið Mary gekk framvið, smeyg hon sær út um politistar og lívverjar og rætti pakkan ímóti krúnrpinsessuni.

Mary steðgaði beinanvegin á og tók ímóti pakkanum. Hon spurdi eisini, hvat var í pakkanum og tá ið Halla segði, hvat var í, fekk hon klemm frá Mary áðrenn hon helt leiðina fram oman á kongsskipið.

Eisini á Tvøroyri tók rættiliga nógv fólk ímóti kongligu gestunum

Heindrikur, prinsur, ber føroysk klæðir væl. Her er hann á veg í bilin eftir døgverðan á Tvøroyri

Tá ið tey kongligu fóru úr Suðuroy aftur seint týskøldið, sita tvørafólk eftir við góðum minnum

KONGLIG VITJAN

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Vitjanin hjá teimum kongligu á Tvøroyri seinnapartin týsdagin, kundi ikki eydnast betur. Veðrið var av tí besta, heilt nógv fólk var komið saman at síggja tey og tey kongligu vóru smílandi og vinarlig vísti gestablídninum ans.

Hóast lítil tíð er á hvørjum stað, eydnaðist tað teimum kongligu at leggja góð minni eftir sær í Suðuroy, tí tey góvu tey sær tær stundir sum yvirhøvur tilbar at heilsa uppá fólk, ung sum gomul og tey tvørafólk.

Fyrsti steðgurin var við skúlan í Trongisvági, har Tvøroyrar Býráð tók ímóti og so var farið beina leið út í byin.

Krúnprinsahjúnini fóru út á ellisheimið, har tey heilsaðu uppá búfólkið og sluppu at síggja sjúkrahúsið.

Kongshjúnini fóru listaskálan Oynna at hyggja eftir listaframsýning og síðani fóru tey í gamla kongliga einahandilin á Tvøroyri, sum enn er í varðveittur í sínm uppruna líki, men sum hevur verið betri kend sum Krambúðin hjá Thomsen nú í nógv ár.

Og har er nógv at síggja, tí umframt at varðveita bygningarnar, hevur Thomsen-ættin eisini varðveitt alt tað gamla skjalatilfarið í handlinu, tó at tað mesta er frá tíðini síðani einahandilin varð avtikin í 1856.

Um kvøldið var Tvøroyrar Býráð vertur fyri ein stórfingnan døgverða, áðrenn tey kongligu fóru úr aftur Suðuroynni við Kongsskipinum Dannebrog klokkan 22.30 týskvøldið.

Gav kongshjúnunum góð ráð

Í røðu síni fyri teimum kongligu ynskti borgar-